Landssjúkrahúsið



# Vælkomin

## á skurð seingjardeild G4/A3

**Vit ynskja tær vælkomnan**

Við innleggjan á skurð seingjardeildina, verður tú móttikin av sjúkrarøktarfrøðingi, ið hevur eina innleggingarsamrøðu við teg, har spurt verður um ymiskt, ið er umráðandi hjá okkum at vita fyri at veita eina so góða røkt sum gjørligt. Í hesum sambandi kann tú eisini seta spurningar og fáa greiðu á møguligum ivamálum. Læknin kemur at tosa við teg annaðhvørt í bráðmóttøkuni ella á  deildini, har støða verður tikin til víðari kanningar og viðgerð.

**Dagliga gongdin á skurð seingjardeildini**

Um dagin hevur sami sjúkrarøktarfrøðingur ábyrgd av eini sjúklingastovu, og tað er hesin sjúkrarøktarfrøðingurin, ið veitir tær stuðul, hjálp og/ella røkt, alt eftir hvønn tørv tú hevur.

Sjúkrarøktarfrøðingurin miðlar samband til læknan og tey planleggja í felag víðari kanningar, viðgerð og /ella útskriving. Hevur tú spurningar til læknan, eru eini góð ráð, at skriva hesar niður, so tú tryggjar tær at minnast tað, tú ynskir at spyrja um.



**Samrøður og fyrispurningar**

Tað er frítt at nýta internet. Loyvt er at hava teldu og at nýta fartelefon, so avvarðandi kunnu seta seg í samband við teg. Umráðandi er, at vísa øðrum sjúklingum ans og at virða hvílitíð alt døgnið.

Um avvarðandi ynskja samrøðu við lækna, skalt tú sum sjúklingur geva loyvi til hetta, og samrøðan er saman við tær. Ynski um samrøðu, skal fráboðast í góðari tíð og síðan verður eitt ávíst tíðspunkt avtalað.
Um avvarðandi ringja á deildina við fyrispurningum, má hetta gerast millum kl. 8.00-9.00 og 14.00-15.00.

**Máltíðir**

kl.  07.30  Vatn ella aðrir drykkir
kl.  08.20  Morgunmatur
kl. 10.00 Vatn ella aðrir drykkir
kl. 12.00 Døgurði
kl. 14.00 Seinnapartsdrekka
kl. 17.30 Náttúrði
kl. 20.00 Kvølddrekka
kl. 22.00 Proteindrykkur



Sjúkur viðføra ofta, at matarhugurin verður niðursettur. Hetta er ein serlig avbjóðing, tí orkutørvurin samstundis økist.
Tískil ynskja vit við tøttum samstarvi við teg, at tú so vítt gjørligt ikki kemur í eina støðu við føðslutroti. Ein seðil við matarskrá er á hvørjum songjarborði. Um tú hevur serlig ynski viðvíkjandi mati, kanst tú kunna sjúkrarøktarfrøðingarnar um hetta.

Ynskiligt er, at komi verður upp at eta til máltíðir.

Dagført: mars 2017

## Sergreinir á deildini

G4/A3 er ein skurðseingjardeild. Her eru allar skurðviðgerðir innan ortopædi, maga-tarmsjúkur, gynokologiskar sjúkur, urologiskar sjúkur, oyra-næsa-hálssjúkur, eygnasjúkur og ymisk sløg av sár.

## Vitjanartíðir

**Vitjanartíð er** millum kl. 15.00-16.00 og kl. 19.00-20.00.
Vinaliga virði hesar tíðir, um onnur avtala ikki er gjørd.

## Viðføri

Tú verður biðin um at hava egnar toilettlutir, inniskógvar og klæðir við, ið eru praktisk og eru til endamálið.
Um tú tekur heilivág, verður tú biðin um at koma við heiligvágnum, tú tekur, umframt fullfíggjað yvirlit yvir heiligvágin, tú tekur.

## Virðislutir

Deildin hevur ikki møgulleika at taka ábyrgd av virðislutum og peningi.

## Prestur

Prestur er knýttur at sjúkrahúsinum. Vit hjálpa fegin við at fáa samband við prest ella annan persón frá samkomu, um ynski er til tess.

## Deildarleiðsla

Elin Vitalis, deildarleiðari, t-postur: lselivi@ls.fo Tel. 304599 lok.5064
Jenny í Gong, varðaleiðari
Birgit Mohr, varðaleiðari
Eyðfinnur Olsen, leiðandi yvirlækni

Landssjúkrahúsið